# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Christina og Johannes Petersen gullbrúdleyp

Fríggjadagin 24. november kunnu hjúnini Christina og Johannes Petersen í Havn, halda gullbrúdleyp.

Gullbrúdleypið verður hildið fríggjakvøldið Í Pálsstovu frá kl. 18-22, har tey ið ynskja at heilsa upp á Christinu og Johannes, eru vælkomin.

Christina er født og uppvaksin í Saltangará og Johannes er Rituvíkingur, men tey hava búð meginpartin av sínum lívi í Havn.

Foreldrini hjá Christinu vóru Jenny, f. Thorkildshøj, av Toftum, og Debes Danielsen úr Saltangará. Foreldrini hjá Johannes vóru Anna Malene, f. Samuelsen, ættað úr Kollafirði, og Thomas Hans Petersen úr Rituvík.

Christina kom sum ung til Havnar, fyrstu tíðina arbeiddi hon í Skálabúðini, annars arbeiddi hon yvir 30 ár hjá Postverkinum í Havn, seinnu árini var hon á Frímerkjadeildini.

Sum ungur var Johannes sjómaður.



Hann flutti til Havnar at búgva í 1956 og arbeiddi tey fyrstu árini hjá Viljormi Tórsheim, byggimeistara, áðrenn hann fór at koyra hýruvogn í Auto í 1960. Hann koyrdi hýruvogn til 1970, tá hann fekk starv á Sementstoypivirkinum hjá Una Persson. Hetta starv røkti hann til 1992.

Síðan sigldi hann sum kokkur og avloysari við skipunum hjá Eiler Jacobsen.

Christina og Johannes hava verið trúføst har tey hava verið bæði í sínum arbeiði, í familjuni og í brøðrasamkomuni, har tey eru virkin. Tey hava t.d. hjálpt væl til á Zarepta í Vatnsoyrum og í Ebenezer, har Johannes hevur hjálpt til við umbyggingararbeiðunum av hesum báðum bygningunum.

Christina og Johannes eiga tríggjar synir, Debes, sum býr í Havn, Hans í Rituvík og Kári í Funningfirði. Barnabørnini eru 15 í tali, og eitt langommu- og langabbabarn.

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Elilja Abrahamsen, Sørvág**, andaðist á ellisheiminum í Vágum 22. novembur, 76 ára gomul. Kistin fer av ellisheiminum fríggjadagin kl. 18 í Sørvágs kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Sálmabókin verður nýtt. Tey ið vilja minnast Elilju kunnu lata Ellisheiminum í Vágum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Davis Maria Rønstad, fødd Jacobsen, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Oslo** andaðist í gjár 22. novembur, 71 ára gomul.

**Dagurin í morgin**

**24. november. Chrysogonos**, deyður umleið ár 300. Halgisøgurnar siga, at hann var kristin einbúgvi, sum varð tikin av døgum meðan Diocletianus var keisari.

## Jóla- og familjukonsertir í trimum støðum

**Føroya Symfoniorkestur skipar í døgunum 2. og 3. desember fyri familjukonsert í Klaksvík, Runavík og Tórshavn.**

**Umframt symfoniorkestrið er eisini stórt barnakór. Solistar eru Heiðrun Petersen, violin, og Atli Petersen tuba.**

**Frásøgumaður verður Herfinn Árnafjall og Bernhard Wilkinson verður dirigentur**



KONSERT

Tann 2. og 3. desember 2006 hevur FSO (Føroya Symfoniorkestur) eina konsertrøð við hugnaligum og løttum tónleiki fyri alla familjuna. Konsertrøðin byrjar í Ítróttarhøllini í Klaksvík leygardagin 3. des. Kl. 11.00, heldur síðan fram í Ítróttarhøllini í Runavík seinnapartin sama dag kl. 16.00 og endar í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn sunnudagin kl. 16.00.

Skráin er fjølbroytt. Byrjað verður við einari syrpu (potpourri) av jólaløgum, skipað fyri orkestur av Leroy Anderson.

Síðani spælir á violin evnaríka Heiðrun Petersen vakra lagið Meditation úr operaini "Thais" av Massenet.

Konsertin heldur fram við sera áhugaverdu søguni um "Tubby the Tuba" og er skrivað av George Kleinsinger. Ein tuba – tað eru kanska ikki øll, sum vita, hvat ein tuba er – men tað eru tey allarstørstu ljóðførini í einum hornorkestri, sum ivaleyst øll hava lagt merki til. Ein tuba í einum orkestri spælir vanliga bassin, og ofta er tað ikki nakað beinleiðis lag, men styðjandi tónar, og onkur argar teir sum spæla við, at tað er bara bum-bum. Tí er tubain øvundsjúk inn á violinirnar, sum altíð fáa besta lagið at spæla, og sum øll lurta eftir. Hvussu hetta tekur seg upp, fer frásøgumaðurin Herfinn Árnafjall at siga okkum.

So fara vit at hoyra "Hedwigs Theme" úr filminum um Harry Potter. John Williams hevur gjørt henda tónleikin. Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, hevur skrivað eitt lag, sum hann kallar "Mánalýsi", og verður tað framført av ungdómsstrúkarum saman við, Erlu, Ingu, Kristinu og Onnu, sum syngja.

FSO heldur fram við nøkrum íslendskum fólkaløgum skipað fyri orkestur av Páli Pamplicher Pálssson. Konsertin endar við at eini stórthundrað børn úr ymsum støðum í Føroyum fara at syngja saman við orkestrinum. Sangirnir vera: "Tað brenna túsund jólaljós í nátt", har Eyðun á Lakjuni hevur gjørt lagið "Nú er desember komin", orð og lag Elsa Annika Simonsen og "So fjart har í vøggu", týskt lag. Orð eftir A. Andreasen. Kári Bæk og Edvard N. Debess hava skipað nevndu løg fyri symfoniorkestur. Atgongumerkini til familjukonsertirnar kosta 75 krónur.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin